Fróðskaparsetur Føroya

3. desember 2009

# Fundarfrágreiðing til fund í bygnaðarbólkinum 2/2009

Dagur og klokkutíð: Tórsdagur 30. november 2009 kl. 13.00 – 14.30

Fundarstað: Náttúruvísindadeildin

Til staðar: Súsanna Mortensen, Jóannes Hansen, Hans Pauli Joensen, Zakaris Svabo Hansen, Birgit Fredriksberg, Rúna Hjelm, Randi Durhuus og Kári á Rógvi. Anni Djurhuus og Hanna Horn kundu ikki møta.

**Skjøl o.a., sum vórðu flýggjað út áðrenn fundin:**
Hans Pauli Joensen, NVD, hevði gjørt uppskot til tvey bygnaðardiagram til fundin. Annað diagrammið varð bygt á skipanina á Náttúruvísindadeildini, meðan hitt diagrammið var fyri alt Setrið við samstarvseindum. Bygnaðardiagrammini og nakrar leinkjur til strategiir fyri universitet í Danmark og Noregi vórðu send út til bygnaðarbólkin áðrenn fundin (leinkjurnar eru aftast í fundarfrágreiðingini).

1. **Hvussu skal arbeiðið skipast í bygnaðartilgongdini?**
Kjakast varð eitt sindur aftur og fram um, hvussu vit best kunnu koma í gongd við arbeiðnum at lýsa bygnaðarligu møguleikarnar á Setrinum. Á fundinum kom millum annað fram, at tað er sera ymiskur bygnaður á deildunum í dag. Semja var um, at fyri at kunna útnytta samlaðu resursirnar á Setrinum á besta hátt framyvir, er tað sera umráðandi at lýsa tær ymisku funksjónirnar, sum deildirnar hava í dag. Harumframt er tað eisini sera grundleggjandi at fáa eina felags útbúgvingarskipan fyri alt Setrið, um tað skal eydnast okkum at samstarva tvørtur um fakultet.
Ein partur av orðaskiftinum á fundinum var eisini at definera, hvat vit meina við fakultet og institutt? Her var semja um, at meðan fakultet eru yvirskipaðar størri eindir, so eru institutt minni fakrelateraðar eindir undir fakultetum. Á føroyskum vera fakultet nevnd megindeildir og tað er eisini heiti sum verður brúkt í lógini fyri Fróðskaparsetur Føroya.

**Niðurstøðan var, at til komandi fund skal:**

- Kári á Rógvi fáa fatur á einum bygnaðardiagrammi fyri Akureyri Universitet.
- Starvsfólkaumboðini í bygnaðarbólkinum skulu gera bygnaðardiagram fyri allar deildirnar á Setrinum eftir modellinum hjá Hans Paula. Tað vil við øðrum orðum siga, at Kári skal gera diagram fyri SSD, Rúna og Randi fyri SSS, Súsanna fyri SRFS, Jóannes fyri FLSK og Zakaris fyri FMD.
- Á sama hátt skulu starvsfólkaumboðini eisini lýsa starvsfunksjónirnar á deildunum. Lýsingin skal eisini vísa, hvørjar funksjónir eru knýttar at gransking, útbúgving og fyrisiting, og ein meting skal gerast av, hvussu stórur partur (prosent/ársverk) fer til funksjónirnar á deildunum.


| Poststaður | Bústaður | Heimasíða | T-postur | Telefon | Faks |
|---|---|---|---|---|---|
| Postrúm 272 | J. C. Svabos gøta 14 | www.setur.fo | setur@setur.fo | 35 25 00 | 35 25 01 |
| FO 110 Tórshavn | FO 100 Tórshavn | | | | |

Komandi fundur verður 14. desember 2009 kl. 13 á Setursskrivstovuni.

Leinkjur til strategi'ir fyri universitet í Danmark og Noregi:

Københavns Universitet:
http://direktoer.ku.dk/styring/strategi/

Aalborg Universitet:
http://www.aau.dk/Om+AAU/AAU+kort+fortalt/Strategi

http://www.aau.dk/GetAsset.action?contentId=765553&assetId=765799

Roskilde Universitetscenter:
http://www.ruc.dk/ruc/omruc/uniberetninger/

Aarhus Universitet:
http://www.au.dk/da/politik

Syddansk Universitet:
http://intern.sdu.dk/enheder/oekonomi/Strategi_og_ledelsedoc/

**Leinkjur til strategiarbeiði á norskum universitetum:**

Universitet i Bergen:
http://regler.uib.no/regelsamling/show.do?id=130

Universitet i Oslo:
2010-2010:
http://www.uio.no/for_ansatte/organisasjon/strategi/strategi2010_2020/Hoeringsnotat2011Endelig.pdf
2005-2009:
http://www.uio.no/for_ansatte/organisasjon/strategi/strategi2010_2020/strategiskplan2005-2009%5B1%5D.pdf

NTNU:
http://www.ntnu.no/omntnu/strategi/2020